## DAGSINS MEINING

# Eitt sjálvsagt krav um javnrætt

Sum hvørja ferð 8. mars er í nánd, verður spurningurin um javnstøðu millum kvinnu og mann umrøddur. Tað er sjálvandi gott at hava ein slíkan dag, har fokus verður sett á hesi viðurskifti, men samstundis er tað spell, at tað gongur so illa við teirri hugburðsbroyting, sum skal til fyri at broyta hesi viðurskifti.

Eitt panel við nøkrum kvinnum og einum manni viðgjørdi evnið í fimmaranum í útvarpinum mikudagin – og tað vóru bara kvinnur, sum ringdu inn og søgdu sína hugsan. Har varð m. a. tosað um javnrættindi á arbeiðsplássum, at tað serliga eru menn, sum eru í leiðandi størvum – og at tað bara eru kvinnurnar, sum fara í barnsburðarfarloyvi. At tað serliga eru tær, ið sita heima, tá børn eru sjúk, eins og at tað næstan bara eru kvinnur, sum arbeiða niðursetta tíð.

Hetta eru staðfestingar. Men tað merkir ikki, at vit skulu góðtaka tær. Tungt er at fremja ta hugburðsbroyting, sum skal til, fyri at broyta hesi viðurskifti. Men okkara kosnu menn og kvinnur hava júst í hesum døgum ein gyltan møguleika at gera eina grundleggjandi broyting:

Vinnunevnd løgtingsins situr í hesi løtu og leggur síðstu hond á álit um nýggjan barnsburðargrunn, sum skal fevna um allan arbeiðsmarknaðin. Hetta er í sjálvum sær eitt sera gott stig, sum landsstýrismaðurin hevur tikið. Sambært uppskotinum fær pápin eisini rætt til farloyvi – og er tað eitt sera stórt framstig.

Í sendingini varð nevndur møguleikin at økja farloyvið upp til eitt ár. Hetta helt umboð arbeiðsgevarans vera sera óheppið, tí tá fóru kvinnurnar at verða ov leingi burtur frá arbeiðsmarknaðinum. Onkur nevndi tá, at maður og kvinna kundu fingið eitt hálvt ár í part. Sambært fyriliggjandi uppskoti frá landsstýrismanninum fær maðurin 10 tær seinastu vikurnar frá konuni, leggur hann í.

Ein byrjan hevði verið, at løgtingið samtykti, at kvinna og maður býta verandi barnsburðarfarloyvi teirra millum, sum tey vilja. Málið kundi so verið, at maður og kvinna fáa eitt hálvt ár í part.

Fyri at fremja eina slíka hugburðsbroyting, sum fremur javnstøðu millum kynini, mugu ótraditionell stig takast. Til hetta krevjast eisini lógarbroytingar og kynskvoteringar, sum eru amboð til tess at náa einum máli. Hetta eru viðurskifi, ið áttu at verið natúrligur partur av arbeiðinum hjá grundlógarnevndini…!

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI



*37 ára gamli klaverleikarin Jóhannes Anddreasen fær starvsløn frá Mentunargrunni Landsins í eitt ár.*

STARVSLØN
*Birgir Kruse*

### Jóhannes Andreasen

Hin 37 ára gamli Jóhannes Andreasen úr Havn, er ein teirra, sum fær starvsløn frá Mentunargrunni Landsins. Í eitt ár fer hann at arbeiða við klavertónleiki og fyrireikingum til fløguútgávu.

Jóhannes er úr tónleikahugaðu ættini, sum í hálva øld úti í Grønlandi í Havn hevur rikið handilin, sum ber navnið á abbanum, sum Jóhannes er uppkallaður eftir.

Eins og fleiri av tónleikarum okkara, hevur Jóhannes nomið sær bæði útbúgving og royndir í altjóða umhvørvi. Umframt í Íslandi og øðrum Norðanlondum, hevur Jóhannes havt konsertvirksemi sum klaverleikari og eisini soloframførslur, eitt nú í bretska høvuðsstaðnum London, í Týsklandi, Sveits og Wien í Eysturríki. Eisini hevur hann havt duo-samstarv við heimskendar solistar og hevur spælt inn kamartónleik á fløgu fyri forløgini Kontrapunkt í Danmark og Extraplatte í Eysturríki.

Nú Jóhannes Andreasen fær starvsløn í eitt ár frá Mentunargrunni Landsins, fer hann at fyrireika og spæla inn tvær fløgur við føroyskum klavertónleiki. Harumframt fer Jóhannes at nýta arbeiðsfriðin til at menna klaverspælið og læra nýtt reportoire, sum skal vera grundarlag fyri dyggari konsertvirksemi næstu árini, bæði her heima og uttanlands.

Jóhannes er við í tónleikabólkinum Aldubáran, sum fer at hava Várkonsert í Listaskálanum, grækarismessukvøld.

### Hanus Kamban

Hin 58 ára gamli Hanus Kamban, sum er uppvaksin í Skúgvi, er ein teirra, sum fær starvsløn frá Mentunargrunni Landsins. Í eitt ár fer hann at arbeiða við bók um skaldið H. A. Djurhuus, bróðir Janusar, sum Hanus áður hevur arbeitt við.

Bæði foreldur Hanusar vóru lærarar. Mamman Elisabeth Kamban úr Havn og pápin Petur Andreassen av Velbastað.

Sjálvur arbeiddi Hanus eisini sum lærararavikarur eitt skifti, til hann fór á bretskan skúla og frá 1966 læs hann enskt og týskt á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Men tá umgdómsuppreisturin tók seg upp í 1968 gavst Hanus við lesnaðinum. Mitt í sjeytiárunum tók hann prógv sum sjúkrahjálpari og búsettist aftur í Havnini.

Í eini fimtan ár hevur Hanus Kamban arbeitt sum rithøvundur burturav. Fyrsti bókatittul Hanusar kom í 1969 »Drekin og aðrar søgur«. Síðani hevur Hanus týtt Graham Green, Ray Bradbury, James Joyce og leikin »Othello« eftir Shakespeare, so ikki kann sigast annað, enn at Hanus hevur økt um klassikararnar á føroysku bókhillunum. Høvuðsverk Hanusar higartil er tó trýbindsverkið um skaldið J.H.O. Djurhuus. Fyrsta bindið kom í 1994, annað í 1995 og triðja og seinasta bindið um Janus, kom í 1997.

Nýggjastu útgávur Hanusar eru »Tann bráðvakra hugsjónin« og »Heystveingir« sum báðar komu í fjør.

Nú Hanus Kamban fær starvsløn í eitt ár frá Mentunargrunni Landsins, fer hann at skriva bók um skaldið H. A. Djurhuus. Hanus fer at viðgera lív og verk Hans Andriasar og týdningin, hann hevði fyri føroysku tjóðina. Bókin skal, umframt at lýsa søgu og bókmentir við trúskapi móti tí mynd, sum skjøl og brøv geva, eisini hava skaldsligt snið. Virksemi Hanusar kann sostatt nevnast fagurbókmentaligur høvundur, sum hevur víðkað sítt verk til eisini at fevna um søgu og bókmentir.

Hanus Kamban byrjaði longu í 1999 at arbeiða við H. A. Djurhuus. Hann metir, at eini trý-fýra ár ganga, til komið er á mál við hesari verkætlan.

Úr arbeiðinum við J. H. O. Djurhuus spurdist sjónvarpssending í fýra pørtum, sum SvF sendi undir heitinum »Kanska um hundrað ár« beint eftir ársbyrjan í 1989. Á sama hátt hevur Hanus fyri Sjónvarpið lagt til rættis sendingar um H. A. Djurhuus.



*58 ára gamli rithøvundurin Hanus Kamban fær starvsløn frá Mentunargrunni Landsins í eitt ár*


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Hava uppgivið at fáa brekað út aftur á arbeiðsmarknaðin

**– Úrslitið av royndunum at fáa brekað og menningartarnað út á arbeiðsmarknaðin er so vánaligt, at vit hava gjørt av at gloyma alt um heimin uttanfyri verkstaðið, sigur Palli Jacobsen, leiðari á varda verkstaðnum í Vági**

ØKISFUNDUR HJÁ JAVNA
*Áki Bertholdsen*



*– Varda Verkstaðið í Vági var fyrr eitt framleiðsluvirki. Men tað var skjótt at tað føldist sum eitt ævigt trýst sum eitt ævigt trýst á Verkstaðið. Og ein dagin fleyt bikarið yvir, segði Palli Jacobsen, v.m. leiðari á varda Verkstaðnum á økisfundinum hjá Javna mánakvøldið. Eisini Dánjal Bjarkhamar, býráðslimur í Vági, sat við pallborðið*

– Vit hava gjørt av gloyma alt um heimin uttanfyri verkstaðið. Tað einasta, vit nú hugsa um, tað er at fáa tey, sum eru her, at trívast so væl á verkstaðnum, sum gjørligt.

Tað sigur Palli Jacobsen, leiðari á varda Verkstaðnum inni á Bakka í Vági.

Mánakvøldið hevði Javni økisfundur kring alt landið. Á økisfundinum í Suðuroy, sum var á varda verkstaðnum í Vági, greiddi Palli Jacobsen, verkstaðsleiðari, frá um Verkstaðið og arbeiðið, sum har verður gjørt.

– Treytin fyri sleppa á Verkstaðið, er, at viðkomandi fær avlamispensión. Tó kunnu fólk, sum ikki fáa pensjón, koma á Verkstaðið ávís tíðarskeið. Men dømi eru eisini um fólk, sum ikki hava fingið pensión í fyrstuni, men sum síðani hava fingið hana, tá ið ein tí er farin.

Palli Jacobsen segði, at hendan reglugerð hevur gjørt, at Verkstaðið er mannað við fólkið sum hava sera ymisk brek.

– Tað er ikki bara at siga tað, at samansjóða hesi fólk í eina eind. Tey, sum ikki eru menningartarnað, skulu slúka nakrar “kamelar” um samstarvið skal verða tað besta. Hetta er ein avgerandi treyt fyri at hetta skal kunna lata seg gera.

Hann segði at á Verkstaðnum í Vági høvdu tey góðar royndir av hesum. Men hann visti, at onnur verkstøð høvdu ikki so góðar royndir av hesari samansjóðing.

### Gloyma alt um heimin uttanfyri

Palli Jacobsen segði, at eftir reglgerðini og endamálsorðingini fyri Verkstaðið, skal tað læra upp menningartarnað og brekað annars, fakliga, soleiðis at tey verða vinnuliga sjalvbjargin.

Harafturat skal Verkstaðið skipa fyri vardum arbeiði til menningartarnað og brekað annars, íð ikki gerast vinnuliga sjálvbjargin.

– Tað vil siga, at vit skulu stuðla teimun, sum her arbeiða, so tey koma í vinnuna aftur.

– Hetta ljóðar gott og hevði eisini borið til, um tað vóru arbeiðspláss, sum kundu tikið hesi í vart arbeiði.

– Men veruleikin er, at tað eru tað ikki. Okkurt verkstað hevur roynt hetta, men við vánaligum úrsliti, segði leiðarin á varda Verkstaðnum í Vági.

Hann segði, at hetta gjørdi, at hann slettis ikki hevði hendan møguleika í huganum longur.

– Sostatt eru vit nú farin at miðsavna alla orku fyri at fáa tey, sum eru á Verkstaðnum, til at arbeiða og at trívast á sjálvum Verkstaðnum.

– Vit hava við øðrum orðum gjørt av at gloyma heimin uttanfyri, segði hann.

### Sloppin úr trýstinum

Palli Jacobsen segði, at aðrastaðni er vanligt, at Verkstøð av hesum slagi, eru framleiðslustøð, har bundnar uppgávur verða gjørdar fyri ávísar fyritøkur.

– Hetta hevur avgjørt nógvar fyrimunir. Serliga um finnast kann fram til eina framleiðslu sum hóskar til tann einstaka brúkaran.

– Hetta letur seg væl gera, eitt nú í Danmark sum er eitt framleiðsluland burturav,og parvís í Havn. Men á Verkstaðnum í Vági eru møguleikarnir sera avmarkaðir.

Hann segði, at í fyrstuni var Verkstaðið í Vági eisini eitt framleiðsluverkstað, tey gjørdu plattar.

– Hetta var eisini ein óførframleiðsla, ið nógv var brúk fyri. Men tað var skjótt, at tað var keyparin sum stýrdi framleiðslini og tað føldist sum eitt ævigt trýst á Verkstaðið.

– Beinleiðis orsøkin til at vit hildu uppat við hesari farmleiðslu, var, at eina páskaaftan kom ein keypari og vildi hava 200 plattar triðja páskamorgun - og ongin plattur var á goymslu.

Palli Jacobsen segði, at tá tók hann ta avgerð, at nú var nokk.

— Eg gjørdi upp við meg sjálvan at hereftir skuldu tað vera vit, sum skulu stýra keyparanum og ikki øvugt.

– Síðani tá hevur tað verið soleiðis, at tá ið vit hava gjørt eitthvørt, sum vit vita at keypari er til, so fara vit til keyparan og bjóða tað fram, sum vit hava á goymslu.

– Men tað er onki við at gera avtalur, um so og so nógvar leveringar frameftir til ásettar tíðir.

Palli Jacobsen segði, at tað var ikki sørt, at onkrir av leiðarunum á hinum verkstaðnum øvundaði Verkstaðnum í Vági, at tað er sloppið undan framleiðslustrongdini, tí tey vóru við at kvælast, av trýsti uttaneftir.

### Tørvurin í hásæti

Palli Jacobsen segði, at sostatt er Verkstaðið í Vági í dag blivið til eitt pedagogiskt og skapandi arbeiðsstað, har arbeiðsgongdin og tørvurin hjá tí einstaka er settur í hásætið.

– Eg havi mangan fingið at vita, at slík arbeiðsgongd er sera krevjandi fyri starvfólkið. Tað er nógv lættari, tá ein ella tvær framleiðslur stýra dagligdegnum.

– Hetta er beint: Okkara arbeiðsgongd setur sera stór kvøv til starvsfólkið.

– Slík arbeiðsgongd ger eisini, at starvfólkasamansetingin er eisini nakað óvanlig. Tað nyttar ikki, at tað starvsfólkini hava góð pedagogisk evnir, men ikki hava skapandi evni. Men tað nyttar heldur onki at starvsfólkið hevur skapandi evnir, men ikki nóg góð pedagogisk evnir.

Umframt hesar førleikar, er tað eisini neyðugt at hvørt starvfólk kann arbeiða sjálvstøðugt og kennur sítt arbeiðsøki.

Leiðarin segði, at tað hevur eydnast at finna hesi fólkini og hann helt, at starvfólkasamansetingin er sera góð.

Hann segði, at partvíst er Verkstaðið býtt sundur í trý arbeiðsøki, eina timburdeild, eina málideild og so sjálv ítrivsdeildin. Á henni verður tað gjørt liðugt, sum kemur frá timbur og málideildini.

### Gera venjingarhøli

Verkstaðið í Vági er í fleiri bygningum. Men síðani er so mikið av ábøtum gjørdar, at nú er alt komið undir somu lon og allir bygningarnir eru lidnir uttan.

Nú vónði leiðarin eisini at fáa játtan til at gera Verkstaðið liðugt innan.

Ætlanin er m.a. at gera eitt venjingarhølið á verkstaðnum.

– At hava eitt venjingarhølið á einu Verkstað, er eisini óvanligt í Føroym, men tey pedagogisku og kreativu støðini sum eg havi sæð í Danmark, gera nógv brúk av slíkum.

Hetta er nakað, sum bæði brúkarar og starvsfólk, kunnu fáa gleði av. Hetta kann eisini vera ein partur av starvfólkarøktini, umframt at brúkarinar kunnu fáa stóra gleði av hesum.

Palli Jacobsen segði, at lítil ivi er um, at tørvurin er stórur

Men hann segði, at slík virksemi ber til, um tað er ein framleiðsla stýrir gongdini.

Hann segði, at tá ið hann luftaði tankan fyri brúkarunum, vóru tey sera positiv og teir eru í veruleikanum spentir uppá at fara í gongd.

– Tá alt er liðug eru karmarnir til nógv meiri virksemi enn okur hava í dag.

Hann segði eisini, at fyri at fingið gjørt timburdeildina og umvælingina, saman við brukarinum, vildi hann fingið sett ein timburmann í starv sum verkstaðshjálpar. Men tað læt seg neyvan gera beint nú.

Annars segði hann, at í løtuni stendur ongin á bíðilista at sleppa á Verkstaðið. Men hann vitsti um fleiri, sum kundu komi á Verkstaðið at arbeitt.